Dagf. 15. november 2024
HMR j. nr. 24/25525-4

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna

Svar

upp á

Fyrispurning nr. 52-051/2024 eftir § 52 a í tingskipanini viðvíkjandi koppsetingar fyri skáldkoppar frá Eiriki í Jákupsstovu, løgtingsmanni.

Spurningur:

1. Hvørjar tankar ger landsstýriskvinnan sær um møguleikan at gera koppseting fyri skáldkoppar til part av koppsetingarætlanini fyri børn í Føroyum?

Svar:
Heilsumálaráðið hevur spurt Sundhedsstyrelsen um ætlan er at koppseting fyri skáldkoppar verður partur av koppsetingarætlanini fyri børn. Sundhedsstyrelsen hevur svarað, at enn er støða ikki tikin til málið, men tey fara at viðgera málið á fundi seinni í november.

Heilsumálaráðið fylgir neyvt við, hvat hendir viðvíkjandi tilboðum um koppsetingar, og Heilsumálaráðið fer somuleiðis at fylgja neyvt við, um tað verður mælt til at koppseta børn fyri skáldkoppar. Verður tilboð um ókeypis koppseting fyri skáldkoppar sett í verk í Danmark, fara vit at viðgera, um sama tilboð skal setast í verk í Føroyum.

Heilsumálaráðið, 15. november 2024

Súsanna Bertholdsen
landsstýriskvinna